# E - og tónleikurin



**Kim Hansen, tónleikari**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Um tú ikki tekur røddina sum eitt ljóðføri, so... nei

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Ja eg elski at spæla piano. Eg spæli eisini onnur ljóðføri men ikki professionelt.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Nei. Tó murri kanska eitt sindur, tá eg havi okkurt nytt lag koyrandi inni í høvdinum.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Ja - tá eg sá Beatlarnar og Little Richard í sjónvarpsglugganum fyrstu ferð.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Sjúkliga nógv -mín sálarhirði. Eg droymi tónleik, til dømis havi eg fleiri fløgur enn bøkur liggjandi á náttborðinum. Eg skrivi tónleik, framføri tónleik og burtursæð frá tí, so eri eg eisini »freak« á tann hátt, at eg keypi flestu tónleikabløð, kanni hitlistarnar hvørja viku í USA, Bretlandi og aðrastaðni....skal eg blíva við?

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Veit ikki, men eitt runt skot: væl yvir 1000 fløgur, 300 lp'ir, 100 singlir, 20 maxi-singlir, væl yvir 1000 kassettubond, Ein rúgva av vhs-bondum, 20 dvd'ir, nakað DAT og Mini-Disc.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Havi ein Top 10, sum varierar hvønn mánað. »Captain Fantasic And The Brown Dirt Cowboy« frá 1975 hjá Elton John hevur havt ótrúliga nógv at siga fyri meg tónleikaliga sæð. Akkordirnar, orðaspælið hjá Taupin, klaverspælið og frálíku melodiirnir. Annars... Abbey Road hjá Beatles. Klaverkonsert nr.2 hjá Rachmaninov, klaverkonsertirnar hjá Beethoven (serliga 5), Grieg, Mozart, Thelonius Monk, Keith Jarret, Stevie Wonder, »Something Magic« hjá Procul Harum, Lillebjørn o.s.fr. Umramt eina rúgvu av føroyskum útgávum sum hava havt nógv at siga fyri mín tónleikaliga uppvøkstur.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Hvussu nógvar pengar tosa vit um?

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Hmm.....Onkur hjá mær sjálvum.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Veit ikki. Eg eri so irriterandi, at eg dámi allan tónleik.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– Veit ikki. Havi ongantíð roynt at sungið karaoke og vil helst sleppa undan.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Norah Jones kanska. Tað veldst um, hvussu hugnaligt, tað er. Kanska Farmers Market.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Ein byttur spurningur...Hvat fyri tónleik vilt tú hoyra týsmorgun?.... Eg veit ikki ring til mín sunnumorgun! Eg skal svara tær, um eg ikki havi spælt kvøldið fyri.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Illa spældur tónleikur, har sokallaðir »tónleikarar« disrespektera tónan og løtuna. Eisini tónleikur, har tað standa tveir og spæla til dans og eitt illa programmerað keyboard spælir trummur, bass og annað, sum kundi havt givið arbeiði til ein erligan tónleikara.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Eingin. Eg dugi ikki at dansa. Kanska ein vísa kundi fingið meg út á dansigólvið.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– »Heart Of Glass« hjá Blondie. Eg man hava verið eini 6-7 ár.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– Tad var deiligt at »Heimið" bleiv so væl móttikin. Tað var ein outsidari í mínum bunka av sangum, sum Steintór Rasmussen setti orð til og Brandur Enni framførdi.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Havi tíbetur ikki hugsað so langt enn, men ókey, hvat vid aria úr »Zaide« hjá Mozart. Tað eru eisini so ótrúliga nógvir flottir sálmar til.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Fyrstu ferð, eg sá mína tónleikahetju Elton John, var fantastiskt. Eisini King Crimson í Forum 2003. Annars vóru tað nógvar góðar konsertir á Tórshavnar Jazz Fólka og Blues festivalinum, til dømis við harmonikuleikaranum Sivuka.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– John Lennon.

whazzzup!!!

Forrige ▾ Næste ▾ | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast ▾

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Carl Eli Nolsøe Samuelsen, carl_eli@hotmail.com
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Føroyskt gestablídni..

Sosialurin hevði eina góða oddagrein 28. apríl; ein dani, ið hevði verið í 3-2 ítróttarsendingini, varð bjóðaður vælkomin til Føroyar. Danin er kendur í føroyska talvheiminum, hevur verið dómari í sambandi við føroysk talvtiltøk mangar ferðir, og hevur seinastu mongu árini hjartaliga stuðlað føroyskari telving. Hann hevur avgjørt at pakkað niður í Danmark og flyta til Føroyar.

Oddagreinin nevnir at danin hevur bjóðað seg fram í sínari frítíð at menna telvingina á klettunum, sum er ein funnin frensur fyri føroyska telving. Sjálvandi skal hann bjóðast vælkomin til Føroyar, og væntandi fær talvítrótturin nógv burturúr honum.

Men her steðgar hitt góða føroyska gestablídni. So skjótt talan er um ein ikki-ES-borgara, ella útlending sum heild, ið nærkast Føroyum, byggir núverandi samgonga, við einum ávísum landsstýrismanni á odda, verjumúr upp. Vit kenna jú til aktuella málið við útlendsku ítróttarfólkini.

Nýggi landsstýrismaður í innlendismálum sær trøll á alljósum degi. Hann er tíverri ikki tann einasti.

Talan er um undir 100 ítróttarfólk, sum geva góðan góðan íblástur til føroyska ítróttarheimin. Tað eru mong ítróttarfeløg sum brenna eftir at fáa styrk, og hjá hesum feløgum er útlendsk megi alneyðug fyri at varðveita eitt ávíst støði og sjálvt felagsgrundarlagið.

Hesi fáu ítróttarfólk tørva helst arbeiði við síðuna av ítróttinum til dagligt breyð, men landsstýrismaðurin - við trøllum í eygunum - ger hetta til eina nærum ómøguliga uppgávu. Útlendingarnir stjala eftir øllum at døma føroysk arbeiði.

Meðan ES opnar seg upp við útvíðkanum í hópatali, har eitt nú Turkaland møguliga innan ikki ov langa tíð gerst limur, ætlar samgongan at búra Føroyar inni og senda ræðumyndir út til føroyingar um hesar stakkals óseku útlendingar, sum í roynd og veru vilja koma hendanvegin at gera sítt ítarsta fyri nýggju feløg síni og samfelagið.

Tak eitt nú navnframa Piotr Krakowski, ið kom til Føroyar og B71 í 1989. Hesin maður er sanniliga ein styrkur fyri samfelagið. Tað eru sandingar í øllum førum samdir um. Ein arbeiðshestur sum fáur.

Skulu vit veruliga útihýsa fleiri av hesum persónum orsakað av ræðslu og tápuligum fremmandaótta, sum tað veruliga botnar í?

Vit eiga sjálvsagt at yvirtaka útlendingalógina frá dønum sum skjótast. Uttan at koma nærri inn á politiska vígvøllin, so er spurningurin um hesir útlendingar taka nakað frá samfelagnum, ella hinvegin eru eitt positivt íkast fyri føroyar. Eg eri ikki í iva.



**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ein langustund fyri Norðurlond

**ES-víðkanin er ein risastór avbjóðing fyri tað norðurlendska samstarvið, heldur aðalskrivarin í norðurlendska ráðharraráðnum**



ES OG NORÐURLOND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Allar tær norðurlendsku marknaforðingarnar mugu beinast burtur. Vit mugu skipa eitt felags norðurlendskt granskingarumhvørvi, har tey einstøku londini sleppa sínum egnu áhugamálum. Gera vit ikki tað, kunnu vit gloyma alt um Norðurlond sum ein orkudepil í tí nýggja Evropa.

Tað sigur aðalskrivarin í norðurlendska ráðharraráðnum, Per Unckel, sum kortini heldur, at Norðurlond hava eina góða støðu í tí broytta Evropa, nú tey mið- og eysturevropeisku londini eru komin upp í ES.

Hann heldur ikki, at tey baltisku londini fara at sleppa samstarvinum við Norðurlond, sjálvt um tey nú eru komin upp í Evropasamveldið. Sjálvt um tey í hesum døgum venda eygunum ímóti Bruxelles, fara tey aftur at venda sær ímóti Norðurlondum, sigur Per Unckel við Aftenposten. Hann heldur, at samstarvið við tey baltisku londini kann geva Norðurlondum møguleikar at økja samstarvið við Póland.

Per Unckel vísir á, at á nýggjárinum næsta ár koma tey baltisku londini upp í tað norðurlendska samstarvið ígjøgnum limaskapin í norðurlendska íløgubankanum, og at samstarvið verður víðkað tey næstu árini. Harafturateru fleiri ætlanin, har Russland eisini er uppií, og alt hetta kann geva Norðurlondum nógvar og stórar møguleikar, heldur hann.

Aðalskrivarin sigur tað hava skund at lata tann "innara innara" marknaðin í Norðurlondum upp.

# Tað var líka frægt við við Saddam Hussein



*Irakar eru fegnir um, at Saddam Hussein varð koyrdur frá, men teir halda seg kortini ikki hava fingið tað betri*

*Mynd: Reuters*

**Irakar halda, at tað var rætt at koyra Saddam Hussein frá, men samstundis siga teir, at teir høvdu tað líka gott tá**

IRAK

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

61 prosent av irakunum halda, at tað var ómakin vert at koyra Saddam Hussein frá, sjálvt um tað hevur elvt til ruðuleika í landinum og hevur kostað nógvum irakum lívið. Tað sæst í einari kanning, sum Gallup hevur gjørt, og sum er tann størsta av sínum slagi síðani innrásina í fjør.

Men samstundis eru irakar ósamdir um, hvørt teir hava tað betur nú enn undir Saddam Hussein. Í kanningini siga 42 prosent av teimum 3.444 spurdu irakunum, at støðan í landinum er betri nú enn undan krígnum, men onnur 42 prosent halda, at hon er verri. Spurdir, um innrásin hevur gjørt størri gagn enn skaða, svara 33 prosent ja, meðan 46 prosent siga nei.

Kanningin vísir, at irakar hava ikki álit á amerikanarum og bretum. 54 prosent siga, at USA ætlar sær at stýra irakska búskapinum, og 57 prosent vænta ikki, at USA fer at lata irakar avgera sína politisku framtíð. 55 prosent vænta, at amerikanararnir fara ikki úr Irak, fyrr enn irakar noyða teir at fara haðani.

Stjórnarráðið, sum USA hevur mannað, er heldur ikki væl umtókt ímillum irakar. Bara 20 prosent siga, at stjórnarráðið eigur at taka við valdinum tann 30. juni. 58 prosent vilja hava ST at manna eitt ráð, sum skal stýra landinum.

## Kerry fyri atfinningum

Demokraturin Jessie Jackson fýlist á, at teir amerikonsku minnilutarnir eru ov illa umboðaðir í tí hópinum, sum skal hjálpa floksfelaganum John Kerry at vinna forsetavalið í heyst.

Jessie Jackson, sum er svartur, sigur, at at kalla bara hvítir amerikanarar eru í valhópinum hjá Kerry, og hann væntar, at hetta kann koma tí demokratiska valevninum aftur um brekku. Men talsmaðurin hjá John Kerry, Paul Rivera, er ikki heilt samdur við Jackson. Hann sigur við tíðindastovuna AP, at av teimum sjey fólkunum í hópinum eru fýra hvítir amerikanarar, tveir eru svartir, og ein er av latínskum uppruna.

Hinvegin viðgongur Paul Rivera, at í tí ráðgevarahópinum, sum vegleiðir Kerry í fjølmiðlaspurningum, er myndin ein onnur. Har eru øll hvít, men talsmaðurin heldur kortini ikki, at hetta fer at ávirka sjálvt valið.

## Fleiri fáa astma

Ein norskur granskari hevur í einari umfatandi kanning staðfest, at talið á astmatilburðum í Noregi er trífaldað tey seinastu 30 árini. Niðurstøða hansara er, at astma er vorðin ein fólkasjúka í Noregi.

Jan Brøgger hevur kannað títtleikan av astma í Noregi í árunum frá 1972 til 1998, og við norsku tíðindastovuna NTB sigu hann, at tað er sannlíkt, at tíggju prosent av øllum norðmonnum hava astma. Men tað er trupult at finna orsøkina. Jan Brøgger sigur, at hóast luftin í býunum er reinari nú enn fyrr, og hóast færri fólk roykja nú enn fyrr, eru tað altsamt fleiri, sum fáa astma. At astma og ovurviðkvæmi hava samband við hvørt annað kann ikki vera orsøkin, sigur hann.

Ein kanning, sum Jan Brøgger gjørdi fyri nøkrum árum síðani, vísti, at títtleikin av astma í Oslo tvífaldaðist í árunum frá 1985 til 1998.

## Eingin royking á strondini

Mikudagin samtykti býráðið í Los Angeles at banna fólki at roykja á strondini, á busssteðgistøðum og á fleiri brúm í býnum.

Bannið umfatar einar tjúgu klilometrar av strondini við Los Angeles, har nógv fólk plaga at hugna sær í summarhitanum, og tey, sum kortini festa sær í, kunnu vænta at fáa 1500 krónur í bót. Sambært borgarstjóranum í Los Angeles, Richard Bloom, hevur bannið trinni endamál. Tað skal verja umhvørvið, tað skal verja tey, sum ikki roykja, og so skal tað virka við til at halda strendurnar reinar, sigur hann.

Tað er ikki óhugsandi, at somu reglur verða settar í gildi í Noregi. Tann 1. juni fáa norðmenn eina nýggja roykilóg. Hon bannar ikki royking á strondini, har fólk hugna sær, men blaðið VG skrivar, at tað kann væl hugsast, at lógin fer at umfata baðistrendurnar seinni.

## Øll lík skulu brennast

Myndugleikarnir í norska býnum Tromsø hava gjørt av, at tey bæði næstu árini skulu øll, sum doyggja, brennast.

Orsøkin er, at tað er ikki pláss fyri teimum í kirkjugørðunum. Leiðarin í kommunalu umsitingini, Irene Valstad Simonsen, sigur við Nordlys, at býráðið hevur ikki annað í at velja, men hon uggar seg við, at fleiri aðrir norskir býir hava sama trupulleika. Býráðið hevur gjørt av at gera ein nýggjan kirkjugarð. Har verður pláss fyri 8.000 gravum, men tann kirkjugarðurin verður ikki liðugur fyrr enn um tvey ár.

Í eldrafelagnum í Tromsø eru tey sera hørm um boðini frá kommununi. Formaðurin, Bjørnar Østgård, heldur, at tey flestu vilja verða jarðað í einum kirkjugarði, og at tað verður torført at fáa fólk at skilja, at tað ikki skal lata seg gera. Tí verða tað mong, sum fara at fáa stórar sálarligar trupulleikar hesi bæði árini, sigur eldraformaðurin við Nordlys.